## Klumman



**Dorit Hansen**
blaðkvinna
dorit@sosialurin.fo

## Mouttøkur eru ikki fyri fólk

Miðlastjórar fróddust á móttøku seinasta fríggjadag um, at fólk og miðlar kundu hittast til móttøku. Meðan eg royndi at fáa eyga á 'fólkið' í stúvstappaða Miðlahúsinum, kom eg at hugsa um summarferiur í Hattarvík. Har vóru aðrar móttøkur og onnur fólk.

– Posturin kemur, róptu tey í Hattarvík. Og so fór alt, sum gekk á tveimum beinum – og nøkur fýrbeint eisini – oman at taka ímóti.

Millum stórar hundar og slitnar gummiskógvar gingu vit børn og hugdu at, meðan bygdarfólk tóku í móti posti, vørum og avbygdafólki og sendu mjólkaspannir, post og avklimatiserað býarfólk avstað aftur. Hetta vóru móttøkur, sum vildu nakað.

Kvøldið eftir fínu mouttøkuna í Vágsbotni gekk eg ein túr millum húsini í Kunoy. Skýmligt var at ganga í smáu túnunum, men ljós var í hvørjum hjalli. Ein hjallshurð stóð á gloppi, og á vegginum hingu eitt ótal av veðrahornum.

Hornini bóru boð um eitt annað slag av móttøkum, sum í hesum døgum verða hildnar í flestu bygdum í Føroyum. Til hesar móttøkur – sum ikki eita móttøkur, men slakt – hittast fyrrverandi og núverandi bygdafólk til arbeiði, hugna og prát.

Móttøkur – altso tær veruligu mouttøkurnar – eru eitt Havnafenomen. Her hittast almenna fyrisitingin, stórkapitalurin og hámentanin. Og sjálvandi vóru hvørki hattarvíksfólk ella kunoyingar at hóma, tá sosiala miðlahúsið og fólksliga útvarpsrásin skipaðu fyri móttøku.

Men kanska stóð lurtið frá í onkrum køki í Kunoy. So tey kundu fylgja við, hvat ið veruliga hendir í hesum landinum. Á móttøkum í Havn.

umborð

# Allir túrar eru spennandi

**Tað var ein dapur túrur við rækjuskipinum Ango í Kanada á sinni. – Fyrst mistu vit ein mann, síðan fekk eg stóran skaða. Meðan eg lá á sjúkrahúsi í Nuuk, fekk ein annar føroyskur bátur mannin í trolið. Alt hetta hendi í 14 dagar, sigur Ólavur Poulsen**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Ólavur Poulsen í Klaksvík eigur útróðrarbátin Søkan, fyrrverandi Fiskaklett. Hendan bátin keypti hann tíðliga í vár, men frammanundan hevði hann ein annan Søka, fyrrverandi Árnabúgvan, bygdur á Lítlubeding í Klaksvík í 1965 - júst sama ár, sum Ólavur er føddur. Árnabúgvin er longdur 20-tonsari, meðan Fiskaklettur er 50-tonsari.

- Eg havi siglt alt mítt lív, og fyri hálvum fjórða ári síðan legðist eg uppi at rógva út í egnum báti. Vit eru 3 mans umborð, og í landi skipar pápi mín, Óli Poulsen, fyri egningini.

Sum 42 ára gamal, telist Ólavur millum yngra ættarliðið av útróðrarmonnum.

- Mær dámar sera væl at rógva út, tí tú ert tín egni harri. Spenningur er á hvørjari ferð, og tú veitst ongantíð, hvussu dagurin vignast. Jú, eg eri millum yngru útróðrarmenninar um okkara leiðir. Onkur er komin aftrat í seinastuni, men tað eru fáir, sum leggjast til.

Ólavur hevur altíð havt stóran áhuga fyri sjónum. Tað liggur líka sum í blóðinum. Bæði mammubeiggjar og beiggjar Ólavs eru siglandi. Beiggjarnir eiga Ågot, og tað var bróðir hansara, Poul Eyðfinn, sum var fyri løsti og doyði umborð á Ågot, tá teir fingu brotasjógv fyri nøkrum árum síðan.

Men Ólavur hevur eisini upplivað, hvussu náttúrukreftir og tungur reiðskapur kunnu hátta sær, tá illa vil til. Tað venda vit aftur til.

Sum blaðungur var hann einar tveir túrar við línubátinum Rókhamri, ein undir Íslandi og ein undir Føroyum. Teir egndu úti og royndu í einar 5-6 dagar hvønn túrin.

Eftir túrarnar við Rókhamri, fór Ólavur at arbeiða á trolvirkinum hjá Kjølbro, og har var hann í hálvt annað ár.

Hann fór nú á laksaveiði við Dragasundi í tveir vetrar, og var onkran túr á ísfiskaveiði undir Føroyum um summarið.

- Tað var buldrasligt at vera á laksi á hávetri, men vit tjentu væl. Prísurin var høgur, og eg trúgvi, at hetta var ein orsøkin til, at føroyingar fingu eyguni upp fyri møguleikanum at ala laks.

Ólavur hevði ætlað sær at lært okkurt og søkti tí at sleppa sum el-lærlingur. Hann kundi sleppa í læru, men fór ikki kortini.

- Eg haldi, at tað var møguleikin fyri at tjena pening, sum dróg meg til skips aftur, sigur hann.

Í 1985 fór hann við rækjuskipinum Karinu, har onkur av brøðrum hansara eisini var við.

- Hetta var ógvuliga áhugavert, og hetta var eisini ein góður kjansur, sum ikki ein og hvør fekk. Vit royndu við Svalbard og í Eysturgrønlandi. Vit tjentu einar 400.000 krónur hetta eina árið.

Ólavur sigur, at tað gekk so væl við Karinu, at hann rættiliga fekk blóð á tonna at tjena.

- Eg var soleiðis fimm túrar við út í eitt, og minnist eg rætt, var eg bert nakrar heilt fáar dagar heima hetta árið.

Eftir tíðina við Karinu, fór hann á skiparaskúla í 1986 og gjørdist liðugur á Klaksvíkar Sjómansskúla í 1987.

- Síðan eg fekk skiparaprógv, havi eg brúkt míni pappírir hvønn dag, og havi verið á sjónum øll árini síðan.

Hetta merkir, at starvið hjá Ólavi øll hesi ár hevur verið á eini skipsbrúgv.

- Fyrsta skip, eg førdi eftir skúlan, var snelluskipið Dragin, ið verfaðir mín átti. Hetta er skúlaskip í dag. Vit gjørdu ein hampiligan Íslandstúr.

Hann var umborð á Draganum einar 2-3 túrar sum skipari.

Nú bar leiðin yvir til Grønlands sum stýrimaður umborð á línubáti, ið mammubeiggi hansara, Sigmund Andreassen, førdi.

- Eg var í Grønlandi í tvey ár, og endaði sum eftirlitsmaður fyri KGH umborð á týskum trolarum.

Tá hann kom heimaftur, varð Ólavur biðin at koma yviraftur til Grønlands sum skipari við grønlendska rækjubátinum, Qaqqaliaq, sum nakrir brøður har yviri áttu. Men hetta gjørdist bara til tann eina túrin.

- Hetta var ein lítil bátur, og líkindini vóru keðilig.

Hann heldur, at nú kann tað kanska tykjast, sum tíðin umborð á summum skipum var heldur stutt, men tá tú ert ungur og hevur fingið tíni pappírir, hevur tú lyndi at siga ja til næstan alt – og so býðst aftur ein nýggjur møguleiki.

- Tú skalt jú eisini gera tær tínar royndir.



*- Mær dámar sera væl at rógva út, tí her ert tú tín egni harri. Spenningur er á hvørjari ferð, sigur Ólavur Poulsen Mynd: Snorri Brend*

Ólavur var bert 24 ára gamal, tá hann fyrstu ferð fekk skiparakjans við grønlendskum rækjubáti.

Nú fór Ólavur sum annar stýrimaður við rækjuskipinum Ango, sum Agga í Garðastovu førdi. Stýrimaður var Kaisten Lognberg.

Hann var tríggjar túrar við hesum skipi, tveir við Svalbard og ein í Kanada. Ein partur av tíðini, teir vóru í Kanada, gjørdist ein ring tíð.

- Eg kom til skaða umborð á Ango. Vit lógu fastir í illveðri, og tá vit skuldu skjóta trolið útaftur, fekk eg weirin sendandi um kroppin. Vanlukkan hendi, tá weirurin leyp upp um "oynna" á troldekkinum og sendi meg út í keysina.

Ólavur minnist einki frá tilburðinum, fyrr enn læknin nakrar tímar seinni stóð uppi yvir honum umborð á skipinum.

Læknin var komin út við tyrlu, og tað vísti seg, at Ólavur hevði fingið innvendugt kraniubrot.

- Tað tók einar 18 tímar at sigla inn til Nuuk, og tað gekk ein heil vika á sjúkrahúsi, áðrenn eg megnaði at reisa meg. Tað vísti seg eisini, at skaðin var gingin útyvir balansuskipanina.

Í dag merkir Ólavur ikki størvegis til skaðan, hann fekk.

- Vit mistu eisini ein kanadiara, meðan vit royndu í Kanada. Hetta var ótrúliga óbehagiligt, tí eingin visti, hvussu maðurin var farin fyri borð. Tá vit høvdu leitað í rúma tíð, boðaðu vit frá, at maður var saknaður. Vit og onnur skip á leiðini fóru at leita, men maðurin kom ikki aftur í aftur.

Ólavur sigur, at Ango misti mannin umleið eina viku, áðrenn hann kom til skaða umborð, og umleið eina viku seinni, meðan hann enn lá á sjúkrahúsi í Nuuk, fekk Faroe Prawn mannin í trolið.

- So, hetta var ein døpur tíð, ásannar hann.

Eftir tíðina umborð á Ango, fór Ólavur sum stýrimaður við Arctic Sea, sum hevði ligið leingi. Tvíburðabeiggi hansara, sum eitur Hjalti, var millum aðrar á dekkinum. Hann var eisini ein av eigarunum saman við eitt nú Teymavirkinum og norðmonnum. Eftir tveir túrar undir føroyskum flaggi, flaggði skipið yvir til kanadiskt flagg.

- Soleiðis endaði mín karriera sum rækjumaður. Hevði man sloppið til Kanada tá, trúgvi eg, at nógvir møguleikar høvdu verið har yviri, tí eg hevði góð sambond við eitt nú norðmenn, sigur hann.

Ólavur gekk nú heima í einar tveir mánaðir og fór síðan umborð aftur á rækjubátin Karinu, sum tá kallaðist Olympic Champion. Her var hann við í eitt ár sum stýrimaður.

Av Olympic Champion fór hann í 1992 út at sigla við donskum farmaskipi, sum hann var við í fýra ár.

- Tú visti ikki heilt, hvat tú skuldi gera. Kreppa var, og her var stórt arbeiðsloysi. Eg søkti tá kjans við donskum farmabáti – og slapp við beinanvegin. Vit sigldu við ymiskum farmi um at kalla allan knøttin. Longsta tíð, vit vóru í sjónum út í eitt, var í 45 samdøgur.

Seinasta skipið, Ólavur var við, áðrenn hann fór at rógva út, var við einum brunnbáti.

- Eg var soleiðis skipari við brunnbáti í 9 ár, men sum tíðin leið, sást tú, hvønn veg tað bar við alivinnuni. Nú var útróðurin farin at blóma, og bátarnir fingu nógvan fisk. Tað var tá, eg gjørdi av at keypa bát og fara at rógva út, sigur Ólavur Poulsen.